## Biður rík um hjálp

Í Grikkalandi hevur stjórnin tikið eitt heldur óvanligt stig í royndunum at fáa landið burtur úr teirri sera álvarssomu búskaparkreppuni. Stjórnin hevur heitt á múgvandi gikkar og biðið teir hjálpa sær eftir førimuni. Millum teirra, sum hava svarað stjórnini, er tann heimsgitna songkvinnan Nana Mouskouri. Hon sat í ES-tinginum í 1990 og hevur nú latið griksku stjórnini sína tingmannaeftirløn, sum er um 100.000 krónur um árið. Nana Mouskouri hevur selt meiri enn 340 milliónir plátur kring heimin, so hon man hava eitt sindur at lata av.



## Agigdor avhoyrdur

Ísraelski uttanríkisráðharrin, Avigdor Lieberman, hevur verið til avhoyringar hjá løgregluni, sum fegin vil hava at vita, hvussu Lieberman fekk fatur á nøkrum skjølum, sum høvdu samband við eina kanning, sum løgreglan gjørdi ímóti honum fyri hálvum øðrum ári síðani. Løgreglan heldur seg hava prógv fyri, at Avigdor Lieberman er sekur í sviki og embætismisbrúki, og andstøðan hevur biðið um, at hann verður loystur úr starvinum sum uttanríkisráðharri. Sjálvur sigur ráðharrin, at hann er ósekur, og at hann er offur fyri einari mannajagstran.

# Fiskivinna við kós mó

**At tað manglaðu 800 milliónir krónur í á fíggjarlógini fyri 2010 eigur ikki at koma óvart á nakran politikara. Seinastu fimm árini hava flestu barometrini í høvuðsvinnuni vent pílinum beint niðureftir**



GREINING
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Flest øll munnu vita av, at á fíggjarlógini fyri 2010 manglaðu omanfyri 800 milliónir krónur í, fyri at fáa javnvág millum inntøkur og útreiðslur, og at í 2011 verður ómetaliga ringt at sleppa undan einum trýsiffraðum milliónahalli afturat.

Men hetta eigur ikki at koma óvart á nakran av okkara fólkavaldu politikarum. Tí barometrini í høvuðsinntøkukeldu okkara, fiskivinnuni, hava tey flestu vent pílinum beint niðureftir tey seinastu fýra til fimm árini.

### Minni toskur enn í kreppuni

Flestu mundu vita av, at toskurin var illa fyri, og at lítið var útflutt av toski. Nýggjastu tølini vísa tó, at útflutningurin av toski í 2009 endaði niðri á tilsamans 402 milliónum krónum.

Samanborið við 2008, tá vit útfluttu fyri 604 milliónir krónur av toski, er hetta ein minking upp á ein triðing.

Fara vit bert 6 ár aftur í tíðina, til 2004, so er tað minkað niður í eina helvt, og samanborið við 2002, sum var eitt metgott ár, har vit útfluttu fyri eina milliard í toski, er tað minkað við 60 prosentum.

Fyri at finna so lítil útflutningstøl fyri toskin noyðast vit at leita heilt aftur til kreppuárið 1993, tá toskaútflutningurin var 389 milliónir krónur.

Eitt er tó, hvat vit útflyta fyri, og annað hvnn prís, vit fáa fyri hvørt útflutt kilo av toski.

Koma vit inn á nøgdirnar, so vórðu í 2009 útflutt 12.881 tons av toski, meðan sama talið í 1993 var 16.775 tons. Tó fingu vit fleiri krónur fyri toskin í 2009, og merkir hetta, at vit eru vorðin betri at virðisøkja toskin.

Tó bøtur hetta lítið uppá, at nøgdin av toski er komin niður í helvtina av tí, sum verður roknað sum eitt miðalár við toski – svarandi til okkurt um 25.000 tons.

Nøgdin av toski, sum er útflutt hevur eisini verið skjótt svinnandi síðan 2004, sum var eitt miðalgott ár við 25.409 tonsum. Árini eftir var talan um 18.463 tons, 15.800 tons, 14.000 tons, 13.300 tons og nú 12.881 tons.

### Svartkjafturin horvin eftir tveimum árum

Útflutningurin av svartkjafti í 2009 var so lítil samanborið við 2007, at hann er at kalla horvin eftir bert tveimum árum. Virðið fór úr 184 milliónum í 2007 niður í 52 milliónir krónur í 2008 og víðari niður í bert 30,6 milliónir krónur í 2009.

Sostatt útfluttu vit í 2009 svartkjaft fyri bert ein sættapart av tí, vit útfluttu svartkjaft fyri í 2007.

Svartkjafturin hevði ann-ars spakuliga síðani 1999 kvinkað seg uppeftir á listanum yvir týdningarmikil fiskasløg til útflutning. Í 1999 varð útflutningurin av svartkjafti góðar 10 milliónir krónur, men ár eftir ár vaks upphæddin, upp í 125 milliónir í 2005, 170 milliónir í 2006 og 184 milliónir í 2007. Men eftir bert tveimum árum er henda upphæddin fallin niður aftur í 30,6 milliónir krónur.

Tá talan er um virðisøking av svartkjafti, sæst at føroyingar ikki hava megnað hesa uppgávuna serliga væl í 2008 og 2009.

Í 2007 fingu vit 184 milliónir krónur fyri 68.000 tons av svartkjafti. Árið eftir fingu vit 52 milliónir krónur fyri 56.000 tons av svartkjafti, og í 2009 fingu vit 30,6 milliónir krónur fyri 17.000 tons.

### Triðingurin av hýsuni eftir

Eins og við svartkjaftinum, so hava tvey tey seinastu árini verið at kalla katastrofal fyri hýsuna.

Hýsan hevur annars verið eitt tað mest støðuga fiskaslagið síðani 1998, og hevur virðið á útfluttu hýsuni ligið og svingað millum 294 milliónir árliga og upp í 377 milliónir, tá tað var mest, og frá 2003 og úteftir hevur tað sveiggjað lítið meira enn 17 milliónir krónur hvønn vegin.

Men lítið annað kann sigast enn at tvey tey seinastu árini vísa, at eisini hýsan, sum annars hevur verið eitt gott álit gjøgnum árini í útflutninginum, er skramblað niður í virði.

í 2007 útfluttu vit fyri 322 milliónir krónur av hýsu. Árið eftir, í 2008 var hetta talið minkað næstan eina helvt, niður í 171 milliónir krónur. Henda sama gongdin helt sær eisini gjøgnum 2009, og minkaði útflutningurin av hýsu við 42 prosentum, niður í 99 milliónir krónur.

Samstundis sum virðið av hýsuni er fallið niður í ein triðing upp á trý ár, er nøgdin av hýsuni »bert« farið í helvt sama tíðarskeið